## Dimma kærd til fjølmiðlanevndina


Dimmalætting
ATLANTSFLOG NÓGV SEINKAÐ AV LØGTINGSLIMI

John Johannessen, løgtingsamður, hevur nú kært Dimmalætting til Fjølmiðlaábyrgdarnevndina. Orsøkin er skriving í Dimmalætting mánadagin, tá Dimmalætting skrivar, at løgtingsmaðurin seinkaði fráferð hjá Atlantsflog úr Keypmannahavn mánakvøldið. Blaðið heldur uppá at hava ringt til tingmannin, sum ikki tók telefonina. Ábrygdarblaðstjórin, Árni Gregersen sigur váttar í blaðnum í gjár, at tey hava ringt til hansara fleiri ferðir. John Johannessen hevur síðani fingið prógv frá Vodafone fyri, at Dimmalætting als ikki hevur ringt til hansara, og er henda skriving er nú kærd til Fjølmiðlaábyrgdina.

## 22 hús í gerð í Miðvági

Í Miðvági verður bygt so nógv sum ongantíð áður. 22 hús eru í gerð í Miðvági. Tá eru nýliga útgrivin grundøkir tald við. Síðani Vágatunnilin gjørdist veruleiki, hevur verið nógv bygt í Vágum. Størstur hevur byggihugurin verið í Miðvági, og har heldur nógva sethúsabyggingin fram. Tey flestu húsini standa í gerð í Kirkjabø, har kommunan júst hevur gjørt tveir nýggjar vegir. Tað standa eisini fleiri hús í gerð Norði á Heiðum, sum er nýggjasti býlingurin í Miðvági, tað verða eisini sethús bygd aðrastaðni í bygdini. Jóhannes Klein, bygdarráðsfortmaður sigur við portalin hjá Jóanisi Nielsen, at í næstum verður eisini farið undir at byggja nýggjan barnagarð í bygdini.

# Finna røttu vinklarnar



*Teir nýggju luttakararnir á skeiðnum: Aftast v.m.: Finnur Justinussen og Bárður Lydersen. Miðraðið v.m.: Sunrid í Gong, Judith Johannesen, Jørgen Lützen, Allan Brockie, Helena Dam, Per á Hædd og Jens Kristian Vang. Fremst: Undirvísarin Jørgen Brandt*

Tveir dagar herfyri vóru nýggju føroysk myndafólk á skeiði hjá kenda danska myndamanninum Jørgen Brandt.

Á skeiðnum fingu tey hollan kunnleika um, hvussu ein kann taka góðar myndir, annaðhvørt talan er um myndir til eina lýsing ella eitt portrett.

- Eg legði dent á at vísa teimum, hvussu neyðugt tað er allatíðina at finna nýggjar vinklar, soleiðis at myndirnar kunnu gerast »feitar«. Tey skuldu helst verðið betri myndafólk í dag enn í gjár, sigur Jørgen Brandt.

Á skeiðnum fingu tey eisini kunnleika um nýggjar møguleikar við Photoshop, har ein á telduni kann fáa tað rætta »lukkið« fram í teimum.

- Tað er ikki altíð neyðugt, at ein er faklærdur myndamaður. Tað týdningarmesta er, at tú ert seriøsur og hevur kærleika til fakið, sigur Jørgen Brandt.

Hann er sjálvur sera hugtikin av tí skiftandi ljósinum í føroysku náttúruni. Tí, sum hann sigur, her kann tað skifta sera skjótt – frá regni til bláan himmal eftir lítlari løtu.

- Hetta ger tað spennandi at arbeiða sum myndafólk í Føroyum, sigur Jørgen Brandt.

**sb.**



*Nógv ymisk myndevni eru at finna hjá royndu myndafólkunum – bæði úti og inni*



*Teir báðir umborð á Froyi – vinstrumegin Gunnar Skúvadal og Bjartur Tórhallson – harmast um dálkaðu firðirnar*

# Bjargaðu hálvdeyðari súlu

**Tá Gunnar Skúvadal, skipari á ferðavinnubátinum Froyi ein dagin herfyri sigldi gjøgnum Vestmannasund sá hann okkurt, sum lá og baksaðist í sjónum.**

DÁLKING
*Snorri Brend*
*Myndir: puffin.fo*

Teir komu nærri hesum, og sóu tá, at hetta »okkurt« var ein súla, ið var komin føst í eitt trolpetti.

Dekkarin á Froyi henda túrin, Bjartur Tórhallson fangaði súluna og hjálpti henni leysari

Tað var týðiligt at síggja, at súlan hevði verið føst í trolprettinum í eina tíð. Hon var bæði rak og illa fyri.

Sagt verður, at hetta er ikki fyrstu ferð at teir eru komnir fram á súlur og aðrar fuglar, ið eru vavdir inn í trol og annað órudd, sum liggur og flýtur á sjónum.



*Súlan er komin innanborða og verður nú loyst úr lagdi*